# Øll nevndin er við



*Tveir av nevndarlimunum - Karl Vidtfeldt og Bjarki Mohr - fáa sær eitt prát á flogvøllinum í Lille*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Vanliga plaga bert tveir limir í landsliðsnevndini at vera við sum ferðaleiðarar, tá fótbóltslandsliðið spælir dystir uttanlands. Sum so eru ferðaleiðararnir ikki fleiri í tali hesaferð, men nevndin hjá FSF er eisini øll við á ferðini.

Endamálið við hesum er fyrst og fremst, at nevndin á hendan hátt fær eitt serstakt høvi at arbeiða nøkur mál ígjøgnum. Sonevndir tema-dagar eru settir á skránna bæði hós- og fríggjadagin, og á hesum fer nevndin at viðgera nøkur av meira prinsipiellur málunum hjá føroyskum fótbólti, soleiðis at finnast kann fram til eina felags støðu í hesum.

Ferðaleiðararnir, sum standa fyri landsliðnum á ferðini, eru annars Magnus á Stongum og Jens Erik Magnussen.

**-mørk**

# Hittust í Lille



*Jógvan Martin Olsen og Jákup á Borg stytta sær um stundir, meðan bíðað verður á flogvøllinum í Vágum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Stutt eftir at flogfarið hjá Atlantic Airways hevði sett seg á vøllinum í Lille, var allur hópurin savnaður. Saman við heimligu spælarunum hevði Rógvi Jacobsen, sum spælir í Íslandi, ferðast við leiguflogfarinum. Í Lille hittu teir so danskar og norskar útisetar, eins og Henrik Larsen eisini sjálvur stóð fyri hópinum. Seinasti spælarin, Claus Bech Jørgensen, skuldi leggjast afturat hópinum hóskvøldið, tí hann hevur ligið við búkilsku í vikuni, men verður kortini klárur.

Í Fraklandi heldur landsliðshópurin til á einum gomlum kleystri nakað uttanfyri Lille. Tann bólkurin av áskoðarum, sum kom við flogfarinum mikudagin, heldur til inni í sjálvum Lille, meðan fjølmiðlarnir búgva á einum hotelli, sum liggur í útjaðaranum av Lens, har dystsurin verður spældur.

Hósdagin skuldu enn fleiri áskoðarar koma við øðrum leiguflogfari, og fer tann bólkurin at búleikast í Paris hesar dagarnar.

**-mørk**



*Sum nakað óvanligt hevur FSF hesa ferð valt at geva eitt heraklapp til nakrar av teimum, sum gjøgnum árini hava lagt lunnar undir altjóða luttøkuna hjá føroyskum fótbólti*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Herðarklapp til teir gomlu

Í ferðalagnum, sum mikudagin ferðaðist til Fraklands, vóru eisini nakrir av »gomlu dreingjunum« í FSF.

Orsøkiin til hetta er fyrst of fremst, at Fótbóltssambandið við hesum vil sýna ein serligan heiður, tí hesir á hvør sín hátt hava átt sín stóra lut í teirri støðu, sum føroyskur fótbóltur í dag hevur vunnið seg fram til. Ein støða, sum millum annað ber við sær, at Føroyar nú leygardagin kunnu spæla móti eini so mætari fótbóltstjóð, sum Frakland nú er.

Teir fýra, sum eru við í Fraklandi, eru Kristian Olsen og Dánjal Andreasen, sum báðir hava verið formenn í FSF. Børge B. Hansen, sum í 14 ár var næstformaður. Og Jákup Simonsen, sum var formaður í landslisðnevndini fyrstu nógvu árini av tíðarskeiðnum hjá føroyskum fótbólti á altjóða pallinum.

Tað kann eisini nevnast, at av teimum fýra, vóru Kristian og Børge millum teirra, sum sótu í fyrstu nevndini hjá FSF. Hendan taldi - umframt teir báðar - eisini Markus Køtlum, Jógvan Eliassen og Sverra Trónd. Hartil kann til stuttleikar nevnast, at táverandi forsetin í ÍSF eisini er við á ferðini, og er navnið á tí manninum Jógvan Arge.

**-mørk**

# Hitin verður øgiligur

Tað er ikki frítt, at veðurlíkindini kunnu fáa sítt stóra orð at siga, tá landsliðið leygardagin skal royna seg móti franska risanum.

Tá flogfarið hjá Atlantic Airways setti seg á flogvøllin við Lille, lág hitin oman fyri tey 30 stigini, og sum skilst, so hevur hetta verið støðan í eina tíð.

Komandi dagarnar siga veðurmenninir tó, at tað verður skýggjað, so hóast veðrið framvegis er gott, so kann hópurin troysta seg við, at talan helst ikki verður um venjingar í bakandi sól.

Hinvegin siga somu veðurmenn eisini, at tað verður klárt leygardagin, og tá kann hitin gerast øgiligur. Eisini hóast dysturin ikki verður spældur fyrr enn kl. 21 á kvøldi. Heilt so ringt, sum tað var í Sveis fyri einum ári síðani, verður tað tó neyvann, men fyri føroysku spælararnar hevur tað uttan iva nógv at siga, hvussu veðrið fer at skikka sær. Tað kann í øllum førum verða tungt at elta Zidane, Henry og aðrar í 90 minuttir, um talan samstundis er um tunga og heita luft.

Fyrstu venjingarnar hjá landsliðshópinum vóru á skránni hósmorgunin, og verður uttan iva meira at frætta frá hesum í blaðnum í morgin.

-mørk